# Logikkurin í "bili og bílhúsi", eins væl og "ferju og ferjulegu"!

JÁKUP AV SKARÐI



**Einum og hvørjum smádreingi rennir í hug hvussu bilhúsið skal verða, tá ið ein spælir við bilar. Tí er tað løgið at tankin er so fjarur, tá ið dreingirnir vaksa til og brádliga gloyma, at til eina ferju skal sjálvsagt vera nøktandi ferjulega**

Upp aftur løgnari er, at samstundis sum so nógv ekspertisa er í landinum at nýta milliónir til keikant, so hava SSL og kommunal umboð gloymt at samskifta út í æsir um atløguviðurskiftini í Nólsoy og at fáa tey at hanga saman við endaligu loysnini við nýggjari ferju. Kanska tað er líka frægt, at teir gloymdu tað, tí annars kundi hent at broytingarnar vórðu framdar uttan at atlit var tikið at nóg nógvum viðurskiftum - eisini lokalum.

Beinanvegin Ternan er klár til sigling, skal hon avloysa Teistan. Helst skal Sam eisini eftirkannast í næstum og tá verður Ternan eisini sett inn. Atløguviðurskiftini eru ikki greið fyrr enn um 10 mánaðir og tá verður ferjulegan løgd illa í Nólsoy. Havandi hesi orð í huga, er sannlíkt, at ætlanin tíanverri er at binda framtíðarloysnir byggjandi á eina fyribilsloysn og at fyribilsloysnin við Ternuni er við tí í huga, at Ternan er eykaskipið hjá SSL - ikki tryggleikin hjá nólsoyingum!

MEN! Hetta er jú beint til okkara fyrimun - um ein hugsar logiskt! Kanska er tað ikki so galið at ábyrgdarfólkini ikki altíð sýnast at hugsa logiskt. Loyvi mær tí at seta upp arbeiðsætlan, ið fyri mær er logisk.

**1)** mars 2010: Set í verk detailprojektering og savnað saman tilboð av nýggju ferjuni og hóskandi ferjulegu í molakrókinum! Tit hava frálíkt skitsuprojekt. Nógvir møguleikar eru, um tit ikki stara tykkum blind/-ar í fyribilsloysnini við einum eykaskipi/ tiltaksskipi!

**2)** mai 2010: Set síðani í verk verkætlan at byggja nýggja ferju, ið gevur arbeiði og harvið mat á borðið hjá mongum arbeiðsfamiljum!

**3)** mai 2010: Set SAMSTUNDIS í verk projektering og verkætlan at byggja hóskandi ferjulegu í Nólsoy - hetta er eins og omanfyri eisini arbeiði og løn til nakrar farmiljur!

**4)** jan 2011: Ferjulegan er klár og landið hevur fingið meginpartin av íløgunum inn aftur við arbeiðsskapandi tiltøkum (skattur) og við know-how til bygging frameftir.

**5)** aug 2011: Nýggja ferjan er klár og verður sett at røkja farleiðina um Nólsoyarfjørð.

Avlýsingarnar verða fáar, tí bæði ferja og ferjulega byggja á gott forarbeiði havandi lokal viðurskiftið og júst hesa farleið í huga.

Lat okkum byggja á logiska tankagongd og tryggja støðuga og trygga samferðslu um Nólsoyarfjørð! Tað kundi hent at vaksnu ábyrgdarfólkini nú hava amboð at taka atlit til veður og vind. Mangur ódnardagur kann vera tó at dagurin gerst ljósari.

Við bestu ynskjum um gott og logiskt arbeiðslag - arbeiðsfamiljum, nólsoyingum, ferðavinnuni og mongum øðrum at frama.

# Grønt avgjald í ókeypis bussar

JÓNLEIF JOHANNESEN
Klaksvík



**Landskassin má breiðka lønargrundarlagið. Hetta eru boðini bæði frá politikkarum, búskaparráðnum og øðrum serfrøðingum við**

Eitt avgjald, sum er nærliggjandi at krevja inn, er grøna avgjaldið av bensin og diesel, selt til akfør á landi. Endamálið við einum slíkum avgjaldi er at minka um $CO_2$ utlátið og at fáa fleiri krónur inn í Landskassan.

Avgjøld raka aldrin øll menniksju eins. Í hesum føri eru tað tey menniskju, sum hava longsta veg til arbeiðis, sum gjalda sín bróðurpart av køkuni. Tey, sum trossa miðsavnanini í Føroyum og koyra langa leið til góðu arbeiðini í høvuðstaðnum verða hart rakt. Tí eiga landsins mynduleikar at fremja enn fleiri $CO_2$ sparandi átøk.

**Ókeypis bussar**

Teir eiga at lata fyrstu krónurnar, sum grøna avgjaldið gevur, fara til at uppbyggja eitt gott ókeypis bussamband kring alt landið. Á tann hátt hjálpa tey ráðandi teimum, sum harðast verða rakt av einum grønum avgjadi, samstundis, sum tey ferðandi nú verða tvífalt eggjað til at lata bilin standa. Tað fer at verða tiltalandi at taka ókeypis bussin, tá bensinið og disel er so kostnaðarmikið.

**Nýggj gjaldskipan**

Fyri at fáa enn fleiri okkara at hugsa grønt, eigur ein nýggj gjaldskipan at setast í verk innan Strandferðsluna. Ein gjaldskipan, sum ger at eisini fólk á Streymoynni og Eysturoynni fáa nøktandi peningaligan ágóða av at lata bilin standa. Hetta kann gerast við at knýta Norðoya, Vága, Norðskála og Kollfjarðatunlarnar saman við ferðamannaskipaunum. Alt í eina skipan. Skipanin skal virka á tann hátt, at bilurin bert verður skrásettur einaferð um dagin. T.v.s. at tað kostar tað sama at koyra gjøgnum allar tunlarnar, sum tað kostar at koyra gjøgnum ein og hevur tú goldið í einum tunnli, er ferðabáturin ókeypis. Hinvegin eru tunlarnir ókeypis, um tú hevur goldið umborð.

**Aðrir ágóðar**

Umframt at verða $CO_2$ tálmandi og eitt ískoyti til landskassan, hava hesar broytingar aðrar ágóðar. Millum annað kann enn nevnast, at hesar broytingar javnstilla fleiri føroyingar og hjálpa til at land okkara ikki minkar enn meir. Broytingarnar koma at gera, at Føroyar verður eitt spennandi og bíligt land at ferðast í. Um rætt verður atborið kunnu hesar broytingar verða okkara atgongumerki til at luttaka í altjóða prátinum um $CO_2$ útlát. Vit hoyrdu, hvussu hugtikin øll vóru tá borgarstjórðin í Tórshavn greiddi frá ókeypis bussum. Sjálvt borgarstjórðin í New York lýddi undrandi á.

Hugsið tykkum tí væl um og latið ikki grøna avgjaldið koma at standa einsamalt. Knýtið tað heldur saman við eini ókeypis bussskipan og eini nýggjari breiðari gjaldskipan.

# Lat hurðar upp .... !

ANDRASS SKAALUM
Valevni til Umboðsráðið fyri Ognarfelag Tryggingartakaranna



Tryggingartakarin eigur Ognarfelagið og má hava møguleika at fylgja við, hvat hendur í felagnum, uttan at skula útbúgva seg til loyniløgreglufólk.

At vísa virðing fyri ognarunum, er at geva honum tann rættin hann eigur, baði í mun til tryggingar hansara og so sanniliga eisini í mun til innlit í sítt egna felag.

Ognararnar eiga til eina og hvørja tíð, lætt og ómakaleyst, at hava atgongd til kunning um hvat hendir í ognarfelagnum. Sum er, tykist mær ognarfelagið heldur afturlatið og tørvur er á at lata upp hurðar fyri ognarunum.

Tað er rímiligt at eigarin lætt og ómakaleyst fær kunning um hvør situr í ognarfelagnum, í nevndum tess og hvør stjórnar feløgunum, hvør íløgupolitikkurin er, hvar peningurin er plaseraður og við hvørjum atliti v. m..

Kundin kennir eisini tørv á, at tryggingarfelagið lyftir uppgávuna at átaka sær objektiva kunningarskyldu mótvegis kundunum í mun til hvørjir møguleikar og rættindi hann hevur, eisini í eini skaðastøðu.

Valið til umboðsráði fyri Ognarfelag Tryggingartakaranna heldur fram hesa vikuna, har eg eri valevni. Eg vil virka fyri at hurðar verða lætnar upp so tryggingartakarin fær innlit og kann fylgja við, hvat hendir í tryggingarfelagnum.

Høvuðsmálini eg vil arbeiða við eru í stuttum hesi:

• Betri gjøgnumskygni so man kann fylgja við.
• Vísa virðing fyri fakið, kunda og starvsfólki.
• At kapping er á tryggingarmarknaðinum.
• At vit javnan dagføra dugnaskap okkara.
• At smærri íleggjarar fáa arbeiðsfrið.
• At virksemið kemur føroyska samfelagnum tilgóðar.
• At umsita ognir við dugnaskapi og virðing.

Lesa meir um høvuðsmálini á: www.bricksite.com/andrass/heim

Nýt valmøguleikan!

Hevur tú ella virki títt onkra trygging hjá “Tryggingarfelagið Føroyar” pr. 01. januar í ár, kann tú atkvøða til umboðsráðið.

Atkvøðuseðilin kemur ikki av sær sjálvum, tú skal biðja um at fáa hann sendandi, fyri at tú kann atkvøða.

Atkvøðuseðilin kann umbiðjast á telefon 345600, á t-bræv umbodsradsval@trygging.fo, fax 345604 ella við at fara inn eina av deildunum hjá Tryggingarfelagnum Føroyar.

Atkvøðuseðilin kann eisini umbiðjast beinleiðis á hesi leinkju: www.bricksite.com/andrass/heim

»Sjáldan fast tað í lag, ið kemur í drag«, tí er umráðandi at fáa hetta avgreitt beinan vegin.

Eg vil við hesum biðja um tín stuðul til Umboðsráðsvalið.

# Tit siga økiskvotir, so siga vit kynskvotir!

*Jenny Kingbo, Katrin Gaard, Eva H. Bennicke, Ann Damgaard, Margit Stórá, Doris Bjarkhamar og Hallbera Fríða West.*

Vit vilja hervið mótmæla ætlanini hjá formansskapinum í Løgtinginum at leggja uppskot fyri Løgtingið um aftur at áseta økiskvotir í okkara valskipan uttan at atlit verða tikin til kvinnuumboðan á Føroya Løgtingi. Um ein tílík broyting verður samtykt, so er vandi fyri, at nýfingna framgongdin í kvinnuumboðan í Løgtinginum við seinasta val verður vend til eina afturgongd.

Tað er í øllum førum ein sannroynd, at kvinnuumboðanin við seinasta val øktist úr 9% til góð 21%, og at henda framgongd hendi samstundis, sum valskipanin varð broytt frá 7 valdømum til 1 valdømi.

Tað er eisini ein sannroynd, at um vit síggja burtur frá nøkrum fáum undantøkum, so vórðu kvinnur, við undanfarnu valdømisskipan, bert valdar á Løgting í størsta valdøminum - Suðurstreymoyar valdømi. Trupulleikin tykist verða, at kvinnur ógvuliga sjáldan fáa flestar atkvøður á teimum einstøku listunum, og so eru møguleikarnir so at siga eingir fyri at verða valdar í teimum smærru valdømunum. Tað hevði tí verið upplagt, at formansskapurin í Løgtinginum í sambandi við arbeiðið at fyrireika uppskot til broyting í valskipanini, tók atlit til hesi viðurskiftir. Hóast uppskotið leggur upp til 5 og ikki 7 valdømir, so er hetta neyvan nóg mikið fyri at loysa henda trupulleika.

Í útvarpssamrøðu greiddi Løgtingsformaðurin frá sínum ekka fyri, at um valskipanin ikki verður broytt aftur nú beinanvegin, so skulu vit ikki telja longur enn eitt val fram, so eru øll okkara umboð í Løgtinginum úr Suðurstreymoyarøkinum. Fyri at forða fyri hesi gongd, heldur løgtingsformaðurin, at tað er neyðugt at áseta økiskvotir. Vit vilja tí hervið spyrja løgtingsformannin, hví hann ongan ekka hevur av, at føroyskar kvinnur, sum útgera helvtina av fólkinum í Føroyum, eru so margháttliga undirumboðaðar, sum vit eru. Hví er tað, harra formaður, at ganga veljaranum ov nær, um vit áseta kynskvotir, sum tú valdi at taka til, men ikki um vit áseta økiskvotir? Er tað ikki upp til veljaran at avgera, hvussu Føroyar geografiskt skulu verða umboðaðar í Løgtinginum?

Vit krevja tí, at um Løgtingið fer at viðgera uppskot um at broyta valskipanina við at innføra økiskvotir, so skulu atlit eisini takast til, hvussu vit tryggja kvinnuumboðanina á Føroya Løgtingi, eitt nú við kynskvotum.

Í Løgtinginum í dag hava 28 menn og 5 kvinnur hvør sína atkvøðu. Uttan mun til, hvat fyri grundgevingar verða nýttar fyri at atkvøða fyri ætlaða uppskotinum, so kann ein atkvøða fyri hesum uppskoti ikki skiljast sum annað enn ein roynd uppá at løggeva kvinnur út aftur úr Løgtinginum. Um so verður, so er í øllum førum staðfest, at vit ikki hava fólkaræði í Føroyum.